*Steve Ludlow, forseti í seismikkfyritøkuni Veritas DGC:*

# – Vit vilja brúka nógva orku uppá føroyska økið

*-Eg eri sera fegin um at verða komin til Føroya og her hitta løgmann og aðrar føroyingar - og her greiða tykkum frá, hvussu tit kunnu fáa mestu nyttuna úr okkara seismiska arbeiði við Føroyar sigur forsetin í fyritøkuni Veritas DGC, Steve Ludlow*



*Steve Ludlow, forseti í seismikkfyritøkuni Veritas DGC her saman við Edmund Joensen, løgmanni umborð á Polar Search á Havnini týsdagin. Mynd jan*

JAN MULLER

Týsdagin í farnu viku fóru Føroya løgmaður, Edmund Joensen, skrivstovustjórin í Tinganesi, Marjun Hanussardóttir, orkumálaráðharrin Eilif Samuelsen og 30 onnur innboðin umborð á norska seismikkskipið „Polar Search", ið var komið á Havnina.

Innbjóðingin kom frá forsetanum í stóra seismiska felagnum Veritas DGC, Steve Ludlow, sum var komin higar úr Texas fyri at hitta umboð fyri føroyskar myndugleikar.

Umborð var høvið at síggja skipið og hvussu arbeitt verður við seismisku útgerðini, ið er ætlanin skal vera við til at finna fram til, hvat goymir seg undir føroyska basaltinum.

Polar Search er leigað av Digicon, sum herfyri varð lagt saman við einum kanadiskum felag. Feløgini hava nú fingið felagsheitið Veritas DGC.

**Virkið vestan fyri Hetland**

Digicon er rættiliga virkið vestan fyri Hetland og í Hvítu sonuni millum Føroyar og Hetland. Herfyri fekk felagið loyvi at gera seismiskar kanningar í føroyskum øki, og hesar seinastu tvær vikurnar hava teir skotið sera framkoman 3D seismikk sunnan fyri Føroyar.

Steve Ludlow, forseti í fyritøkuni, kom til Føroya við leiguflogfari mánadagin, saman við fleiri øðrum leiðandi fólkum í USA og Bretlandi. Hetta er fyrstu ferð, at felagið alment vitjar Føroyar. Áður hevur Digicon bjóðað uppá seismisku kanningarnar av øllum Føroyaøkinum, men fekk ikki arbeiðið.

Við drúgvu royndum sínum nærhendis føroyskum øki ynskir felagið nú at gera brúk av royndum og vitan sínum og er tilreiðar at brúka nógva orku her.

**Nýggj øki áhugaverd**

Steve Ludlow, forseti í felagnum sigur við Sosialin, at hetta er ein spennandi tíð, og hann heldur tað vera hugaligt, at so stórur áhugi er millum oljufeløgini fyri Føroyum.

-Vit leggja stóran dent á at vera við til at kanna nýggj øki, og Føroyar eru eitt av teimum áhugaverdu nýggju økjunum. Vit arbeiða við sera framkomnari útgerð og royna at fáa tilfar til høldar so skjótt sum gjørligt sigur Steve Ludlow, sum vísir á, at teir sjálvir ætla sær at vága væl av pengi í hesar kanningar. Harafturat er áhugin frá oljufeløgnum at keypa seismisku kanningar úrslitini eisini stórur.

Veritas DGC fer at halda fram við kanningunum við Føroyar í einar tríggjar vikur aftrat. Um mánaðarskiftið fer Polar Search til Mexikanska flógvan, og skal Polar Princess tá avloysa. Í 1997 koma tvey skip á føroyskt øki at skjóta seismikk og tá verða hesar gjørdar bæði í ein útsynning og ein landnyrðing úr Føroyum.

Við Polar Search, sum fór av Havnini týskvøldið, er eisini eitt lítið „chase" skip, sum fylgir við seismikkskipinum.

Umborð á Polar Search er ein føroyingur. Tað er Bjarki Hendriksen av Sandi. Hann er í løtuni avloysari á Vaktar og Bjargingartænastuni og røkir arbeiði sum fiskivinnuumboð umborð á seismikkskipinum, meðan tað er á føroyskum øki.

Bjarki, sum er skipsføraralærdur, sigur seg dáma sera væl umborð. - Hetta er spennandi arbeiði, og fólkini umborð eru góð at arbeiða saman við.

Hansara uppgáva er m.a. at tryggja, at føroysk fiskiskip ikki koma kanningarskipinum ov nær, tá tað skjýtur seismikk.

Polar Search er annars eitt av teimum væl útbygdu seismikkskipunum. Tað hevur fýra kaðalar har aftur og skjýtur 3D seismikk, ið er sera framkomin.

*Á brúnni á Polar Search, har skiparin greiðir løgmansstjóranum, orkumálaráðharranum og løgmanni frá teirri framkomnu útgerðini umborð. Mynd jan*





*Bjarki Hendriksen av Sandi er fiskivinnuumboð umborð. Mynd jan*

**TVINGSILSSØLA**
**Hosdagin**
**10. oktober 1996**
**kl. 09.40**

verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 194, Elduvík. (AS nr. 152/96)**.

Ognin er eini eldri sethús, 40 kvm til støddar í kjallara, miðhædd og lofti. Grundin grótlaðað, gjørd av timbri, klødd og takt við jarni. El-hiti og oljufýrdur ovnur í køki. Einki sýn hevur verið. Húsini standa tóm. Stykkið er 132 kvm til støddar.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Fríðu Paturssson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 960527)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
*tann 24. sept. 1996*